# Hørð rúsevni gerast vanligari

**Seljarar av hassji og øðrum rúsevnum royna at fáa nýggjar nýtarar millum blaðungar gentur í aldrinum 14 til 16 ár. Myndugleikarnir meta eisini, at fleiri av hørðu evnunum eru komin til Føroyar seinastu árini**

FYRISPURNINGUR
*Stefan í Skorini*

Mynstrið í øðrum londum er júst hetta, at seljarar leggja seg eftir at fáa fatur á blaðungum gentum í aldrinum 14-16 ár. Fútin í Føroyum metir eisini, at gongdin er tann sama her.

Harumframt heldur løgreglan seg hava eina greiða ábending um, at hørð rúsevni gerast alt vanligari. Tølini eru tó so smá, at tey skulu takast við fyrivarni. Løgreglan sigur seg hava greiðar ábendingar um, at hørð rúsevni fyrst og fremst verða nýtt av teimum, ið hava roykt hassj í fleiri ár.

Mogens Nepper-Christensen hevur skrivað eina frágreiðing. Hann sigur, at seinastu tíðina er ein broyting farin fram í mynstrinum, tí hørð rúsevni sum amfetamin og kokain gerast vanligari. Fútin hevur eisini upplýsingar um extacy í Føroyum, men hesar eru ikki serliga ítøkiligar.

## Torfør uppkláring

Fútin sigur eisini, at løgreglan í Føroyum hevur ómetaliga trupult við at fáa bilbukt við trupulleikanum.

– Færøerne er et øsamfund med tætte relationer i befolkningen, hvorfor enhver form for efterforskning på narkotikaområdet udøves under særlig vanskelige omstændigheder, skrivar fútin í frágreiðingini. Hann leggur afturat, at slíkt uppkláringararbeiði krevur nógva tíð og tol.

Hesar eru nakrar av upplýsingunum, ið síggjast í svarinum hjá Høgna Hoydal, landsstýrismanni við lógarmálum, til fyrispurning frá Finni Helmsdal, tingmanni.

Finnur Helmsdal hevur spurt landsstýrismannin um ymisk viðurskifti viðvíkjandi rúsevnanýtslu í Føroyum. Hann vil hava at vita, at hvussu møguleikarnir hjá myndugleikunum eru at fylgja við í rúsevnanýtsluni. Um landsstýrið hevur staðfest, at nýtslan av hørðum rúsevnum er vaksandi í Føroyum, og um landsstýrið hevur ætlanir um átøk ímóti rúsevnum í Føroyum.

## Lægri enn í grannalondum

Øll hagtøl benda kortini á, at narkotikanýtslan í Føroyum er munandi lægri enn í grannalondum okkara.

Í hesum sambandi kann nevnast, at talið á politimálum viðvíkjandi rúsevnum er tíggju ferðir so stórt í Grønlandi sum í Føroyum, og hetta lutfallið hevur verið tað sama seinastu árini. Løgreglan heldur eisini, at nýtslan er minni her enn í smærru keypsstøðunum í Jyllandi.

Í hesum sambandi nevndi Finnur Helmsdal í tinginum, at vit hava ov ofta lyndi til at samanbera okkum við Grønland og Danmark, sum ofta liggja á odda í norðurlendskum høpi, heldur enn at samanbera við onnur norðurlond, har vit síggja, at Føroyar eru einki aftanfyri, tá talan er um nýtslu av rúsevnum millum ung.

## Ein hundur nóg mikið

Fíggjarmálastýrið, sum hevur tollvaldið undir sær, sigur, at teimum ikki tørvar manning í løtuni.

Tó verður víst á, at meðan ferðafólkatalið hevur verið støðugt vaksandi seinastu árini, er talið á starvsfólki fallið. Sagt við øðrum orðum: Hóast færri fólk eru at hava eftirlit við innflutningi av rúsevnum, nú ferðafólkatalið er økt munandi, er eftirlitið nóg gott. Hetta tykist heldur løgið.

Fíggjarmálastýrið metir heldur ikki, at tollvaldið hevur tørv á einum hundi aftur.

Í grein í Sosialinum 31. januar í ár sigur yvirtollarin Kjartan Dam Joensen tó, at smuglarar kanna, hvar einasti narkohundurin í Føroyum er staddur, og leggja síðani sítt virksemi til rættis eftir tí.

Hann segði tá, at tollvaldið umhugsar at fáa sær ein hund afturat, tí ringt er at hava nøktandi eftirlit við bara einum hundi.

## Ov lítil samskipan

Høgni Hoydal vísir í svarinum á, at alt ov lítil samskipan er á hesum økinum, tí tað eru eitt nú fleiri ymisk stýri, ið varða av hesum málinum. Hann heldur, at ein miðvísari samskipan átti at verið á hesum økinum.

Av tí at vit eru ein samrunnin partur av heimssamfelagnum er altíð væntandi, at vit fáa somu trupulleikar at dragast við sum onnur lond. Eingin ivi er heldur um, at ein komandi oljuvinna og aðrar samfelagsbroytingar, ið økja um ferðsluna til og úr Føroyum, fara at økja um útbreiðsluna av rúsevnum.

Høgni Hoydal heldur hinvegin, at tá støðini, har innflutningur fer fram, eru so fá, og samfelagið er lítið og samansjóðað, hava vit góðar møguleikar at forða rúsevnum at fáa fastatøkur á ungdómi okkara



*Finnur Helmsdal fekk í tinginum at vita, at hørð rúsevni gerast alt meira vanlig í Føroyum. Harumframt svaraði Høgni Hoydal, at myndugleikarni ikki hava nóg góðar møguleikar at fylgja við í rúsevnanýtsluni*

**Nøgd av rúsevnum sum hald er lagt á**

| Ár | Hash | Marihuana | Amfetamin | Speed | Heroin | Kokain |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1988 | 1.055,5 gr. | 4,0 gr. | | 165 stk. | | |
| 1989 | 2.326,0 gr. | 1.320,0 gr. | | 230 stk. | | |
| 1990 | 1.206,5 gr. | | | 157 stk. | | |
| 1991 | 2.087,9 gr. | 18,3 gr. | | 26 stk. | | |
| 1992 | 1.859,9 gr. | 6,0 gr. | | 668 stk. | | |
| 1993 | 324,5 gr. | | 0,3 gr. | 10 stk. | | |
| 1994 | 2.854,4 gr. | 7,5 gr. | | | | |
| 1995 | 1.227,3 gr. | | 5,1 gr. | | | |
| 1996 | 551,4 gr. | | | 11. stk. | | |
| 1997 | 35.952,8 gr. | 8,0 gr. | | | 1,0 gr. | |
| 1998 | 496,5 gr. | 10,0 gr. | | | | |
| 1999 | 9.657,9 gr. | | 26,4 gr. | | | 6,0 gr. |
| 2000 | 1.263,1 gr. | | 6,9 gr. | 127 stk. | | |
| 2001 | 6.208,96 gr | 4.1 gr. | 2,36 gr. | 17 stk. | | |

# Høgni Joensen er ikki ónøgdur

**– Eg kann ikki siga, at eg eri ónøgdur við dómin, sigur Høgni Joensen, fyrrverandi aðalstjóri í almanna- og heilsumálastýrinum, nú uppsøgnin hjá honum er dømd ógyldug**

UPPSØGN
*Stefan í Skorini*

Týsdagin seinnapartin tók Føroya Rættur støðu í málinum millum Høgna Joensen, fyrrverandi aðalstjóra í almanna- og heilsumálastýrinum, og Føroya Landsstýri við løgmanni og Sámal Peturi í Grund.

Høgni Joensen hevði stevnt løgmanni og almanna- og heilsumálastýrinum. Hann kravdi í fyrsta lagi, at uppsøgnin var dømd ógyldug at vera, í øðrum lagi at fáa løn í trý ár, men tó ikki meira enn eina millión krónur og í triðja lagi 50.000 krónur fyri tort.

Høgni Joensen fekk viðhald í fyrstu ákæruni, og uppsøgnin varð dømd ógyldug. Hann fær tó ikki starvið aftur. Landsstýrið fekk hinvegin viðhald, tá Høgni Joensen kravdi løn í trý ár fyri fíggjarligan miss.

Rætturin metti, at Høgni Joensen fær eins góða løn í nýggja starvinum, og tí fekk hann ikki viðhald í hesum.

Í triðju ákæruni fekk Høgni Joensen viðhald, og landsstýrið skal gjalda fyrrverandi aðalstjóranum 50.000 krónur í "godtgørelse", sum tað stendur í dóminum. Harumframt fær hann 35.000 krónur í sakarmálskostnaði.

Grundgevingin fyri uppsøgnini hjá Høgna Joensen var, at hann ikki hevði teir røttu persónligu eginleikarnar at vera aðalstjóri. Høgni Joensen var uppsagdur 11. apríl í fjør.

Orsøkin til at uppsøgnin er dømd ógyldug er, at hann ikki fekk eina víðkaða hoyring eftir uppsøgnina, og at landsstýrið ikki gav honum eina neyvari grundgeving fyri uppáhaldunum um hansara persónligu eginleikar.

Landsstýrið segði, at Høgni sjálvur ikki vildi hava hesa hoyringina, men hesum fekk hann so viðhald í.

## Ikki ónøgdur

Høgni Joensen sigur, at hann enn ikki hevur tikið støðu til, um hann góðtekur dómin. Freistin at kæra er fýra vikur, og eingin orsøk er at skunda sær at taka avgerð.

– Eg kann ikki siga, at eg eri ónøgdur við dómin. Dómarin tók jú høvuðsákæruna hjá okkum til eftirtektar, sigur Høgni Joensen.

Uppsøgnin var tí týdningarmiklasti parturin av ákæruni, og hon nú er dømd ógyldug.

Jónfinn Thomsen, advokatur hjá landsstýrinum, sigur hinvegin, at tað mest týdningarmikla er, at landsstýrið varð fríkent fyri tað stóra endurgjaldskravið, og tað er pening, tað snýr seg um í hesum málinum.



*Høgni Joensen sigur, at hann ikki er ónøgdur við dómin. Hann fær 50.000 krónur fyri at vera órógvaður*



# Stríð um orðini

**Fyrst søgdu teir ósatt, so søgdu teirr satt og nú hava teir aftur sagt satt. Lisbeth og Høgni og Karsten kunnu ikki semjast um, hvat er skeivt og rætt. Eitt stríð um orð og sannleika**

POLITIKKUR
*Heri á Rógvi*

Tað var mæti listamaðurin Pablo Picasso, sum segði, at sjálvt um tað bert var ein sannleiki til, so kundu tú framvegis mála túsund myndir av honum.

Í hesum málinum snýr tað seg um. hvør sannleikin er viðvíkjandi lánunum, ið føroyingar tóku í Danmark í sambandi við sváru búskaparkreppuna fyrst í nítiárunum.

Tað er ringt at vita heitl, hvar málið byrjaði, men tað kom í øllum førum ein fyrispurningur frá Lisbeth L. Petersen, um hvørt tað var rætt, at danir høvdu vunnið pengar uppá lánini, ið vórðu latin til Føroya í kreppuárunum.

Hon vísti til útsagnirnar hjá Karsten Hansen landsstýrismanni. Í tíðindaskrivi sigur Lisbeth L. Petersen, at hetta varð gjørt fyri at fáa sannleikan fram, og fyri at sleppa undan illgitingum. Í sama tíðindaskrivi sigur Lisbeth Karsten skal hava sagt, at danir høvdu ein rentuvinning upp á lánini.

Hesum vísir Høgni Hoydal staðiliga aftur.

– Hetta er tað lægsta av tí lægsta í føroyskum politikki. At Lisbeth leggur okkum undir tílikt. Tað er fullkomiliga at manipulerað ein pástand, tí kjakið í tinginum snúði seg um, hvørt danir høvdu mist pengar upp á Føroyar, og hetta hava vit fingið prógvað fleiri ferðir, so tað er grov manipulatión, at Lisbeth nú leggur okkum undir at lúgva, sigur Høgni Hoydal.

Høgni Hoydal og Karsten Hansen hava sent málið í landsstýrismálanevndina.





*Karsten Hansen og Høgni Hoydal hava latið málið um rentuna og kreppulánini til landsstýrismálanevndina*



*Lisbeth L. Petersen hevur eina heilt øðrvísi fatan av, hvussu málið um kreppulánini er háttað*

## Nýtt hugfar á Háskúlanum

TÍÐINDASKRIV

Leygardagin 23. februar skipa politisku ungmannafeløgini fyri ráðstevnu á Føroya Fólkaháskúla undir heitinum "Nýtt Hugfar". Endamálið við ráðstevnuni er at kunna um ungdómspolitiskt arbeiði í Føroyum, eins og at vekja áhugan hjá føroyskum ungdómi fyri politiskum arbeiði. Luttakandi feløgini á ráðstevnuni verða: Fólkafloksungdómur, Sosialistiskt Ungmannafelag, Unga Sjálvstýrið, Unga Tjóðveldið & Ung fyri Miðflokkin.

Ráðstevnan verður sett leygarmorgunin kl. 10:00, og eftir hetta fara feløgini at kunna um sínar hugsjónir,sítt virksemi o.a. Eftir døgurða verður ein fyrilestur um "áhugafeløg & smátjóðir" hildin av Birgir Kruse. Hesin verður, eins og framløgurnar um morgunin, at vera grundarlagið undir einum politiskum kjaki seinnapartin og um kvøldið.

Ráðstevnan endar við cafékvøldið við livandi tónleiki, har Terji Rasmussen, Búi Dam & Unn Patursson fara at spæla tónleik. Tiltakið er ókeypis, og øll eru vælkomin.

Skráin fyri tiltakið er henda:

10.00 Boðið verður vælkomin
10.10 Framløgur um ungmannafeløgini
12.00 Døgurðasteðgur: Farið verður á Sjómansheimið at eta
13.30 Fyrilestur. Birgir Kruse: Smátjóðir og áhugafeløg
15.00 Kjak. Orðstýrarar: Høgni Mohr og John Brian Hvidtfeldt
19.00 Steðgur
21.00 Café: Terji Rasmussen, Unn Patursson & Búi Dam spæla tónleik
01.00 Liðugt

# Vilja sleppa undan handilslýsingum

**Løgtingið hevur fingið upptykt til samtyktar, sum ætlar at forða handilslýsingum í almennu miðlunum. Ùtvarpsstjórin og sjónvarpsstjórin er í iva um uppskotið**

POLITIKKUR
*Heri á Rógvi*

Finnur Helmsdal og Jógvan á Lakjuni hava lagt fram uppskot til samtyktar í løgtinginum. Uppskotið hevði fyrstu viðgerð í gjár, hósdagin.

Nú fýra ár aftaná stendur tó greitt, at avtøkan av einkarrættinum ikki hevur slóðað fyri í tann mun, ætlað varð. Bæði ÚF og SvF hava víðkað um inntøkuvirksemi sítt í slíkan mun, at tað er mest sum ógjørligt hjá møguligum kappingarneytum at liva. Her verður fyrst og fremst hugsað um stóra partin av handilslýsingarmarknaðinum, sum fyrst SvF og síðan eisini ÚF hava lagt seg á. Hetta má metast sum bæði órímiligt og øvugt, tá nógv størsta og kanska eisini einasta inntøkan hjá møguligum øðrum kringvørpum júst er handilslýsingar. Myndin verður enn meira skeiv, tá hugsað verður um, at ÚF og SvF hava einkarrætt til lurtara- og hyggjaragjaldið, skrivað teir báðir í uppskotinum .

Tí verður við hesum skotið upp, at tað verður bannað ÚF og SvF at fíggja virksemi sítt við handilslýsingum. ÚF og SvF eiga leiklutin sum alment stuðlaðir public service stovnar, sum ymsu aldurs- og áhugabólkarnir í samfelagnum skulu hava sítt gagn av, skrivað teir báðir í uppskotinum

## Ikki gjøgnum hugsa

Mikkjal Helmsdal, stjóri í Sjónvarpi Føroya, kallar uppskotið hjá Finni og Jógvani fyri fragmentariskt og ógjøgnumhugsað.

– Teir vísa á fleiri ting, ið taka inntøkur frá okkum, men einki er nevnt um, hvussu vit hendur aftur á inntøkunu, sigur Mikkjal Helmsdal, sum eisini skal taka sær av spurninginum viðvíkjandi, at DR í næstum væntandi verður at síggja í tí mesta landinum.

Sjónvarp Føroya vinnur í dag einar 4 mió kr. um árið upp á handilslýsingar, og hetta eru góð 20% av inntøkuni hjá stovninum.

Jógvan Jespersen, útvarpsstjóri, sigur seg vita av royndum, at tað verður óalmetaliga torført hjá løgtinginum at semjast um hækkanir til almennar stovnar, men tað er hetta, ið skal til, um útvarpið skal halda fram sum er, uttan handilslýsingar.

Útvarp Føroya hevur eina fíggjarætlan upp á góðar 26 mió, og tvær av hesum koma frá handilssligum lýsingum.



*Ùtvarp og sjónvarp skulu eftir broyta grundarlagið munandi í framtíðini*